**Torleif Sigurðsson**

Valevni Javnaðarfloksins í Norðoyggjum



**Maðurin, sum var við til at seta Føroyar á heimskortið**

...Nú standa Norðoyggjar fyri tørni

Tað, sum eg havi lagt stóra orku í seinastu árini, er okkara fótbóltslandslið. Sigurin í Landskrona vísti, at um vit standa saman, so kunnu vit føroyingar alt.



Nú standa Norðoyggjar fyri tørni.

Eg vil leggja alla mína orku í:

- At útvega arbeiðspláss á sjógvi og landi
- Trivnað fyri øll
- Altjóða góðkenda havn í Klaksvík
- Kostnaðurin fyri at koyra gjøgnum Norðoyartunnilin skal ikki verður ov høgur
- Børnini skulu hava tær bestu umstøðunar at vaksa upp í
- Trygg ellisár - við dagførdum hentleikum

Í framtíðini skulu Norðoyggjar ikki verða ein partur av útjaðaranum

NEI, vit skulu verða tað plássið í Føroyum, har tað er best at búgva

Vel Torleif, so er tín framtíð trygg

JAVNAÐARFLOKKURIN C

www.javnadarflokkurin.fo - nakað fyri C

# ítróttur

Nr. 12 • hósdagur • 20. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Plásstrot

Hóast blaðið, sum lesarin situr við í dag, er av teimum stóru, so er framvegis so, at komandi løgtingsvalið tekur sín stóra part av plássinum í blaðnum.

Tí hava vit enn einaferð verið noydd at skerja talið av ítróttarsíðum nakað, og eitt nú merkir hetta, at umrøðan av flogbóltsdystunum um vikuskiftið bíðar til mikudagsútgávuna.

Vit biðja lesararnar halda okkum til góðar.

**-jm**

# Liverpool áhuga í føroyskum málverja

**Málverjin á føroyska U-19 landsliðnum, 17 ára gamli Gunnar Nielsen, hevur í farnu viku verið til royndarvenjingar í enska stórfelagnum Liverpool**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*

Hóast hann einans er 17 ára gamal, hevur Gunnar Nielsen, sum hevur fingið sín fótbóltsuppvøkstur í HB, longu roynt eitt sindur av hvørjum. Til dagligt er hann málverji á unglingaliðnum hjá danska superligafelagnum Frem, og har hevur hann eisini sitið á bonkinum í onkrum superligadysti. Í farnu viku fekk Gunnar so enn eina upplivilving í skjáttuna, tá ið hann var og royndarvandi í enska stórfelagnum Liverpool.



*Í seinastu viku var Gunnar Nielsen á royndarvenjing í Liverpool, og sum skilst var talan um sera positiv skoðsmál á ferðini*

*Mynd: www.hb.fo*

### Skal helst aftur til Liverpool

Á heimasíðuni hjá Frem stendur at lesa, at Gunnar luttók í fleiri venjingum í Liverpool, umframt at hann hevði spælt ein innanhýsis venjingardyst, har málverjin á írska U-16 landsliðnum vardi málið í hinum endanum.

Talentstjórin í Frem, Gert Jensen, sum sjálvur annar var við Gunnari í Liverpool sigur við heimasíðuna www.bkfrem.dk, at talentvenjarin og málmansvenjarin í Liverpool vóru væl nøgdir við avriki hjá Gunnari. Serliga fegnir vóru teir um, at ungi føroyski málverjin er 192 centimetrar til hæddar. Gert Jensen sigur eisini, at hann væntar enska felagið fer at senda boð eftir Gunnar aftur skjótt, so at teir kunnu síggja hann enn einaferð.

Sosialurin fer sjálvsagt at fylgja við Gunnari Nielsen og yrkisdreymi hansara.

# Talentliðið úttikið

**Eftir svimjistevnuna hjá Flot á Toftum, hevur landsliðsvenjarin, Petur Heðin á Fløtti tikið út 16 svimjarar til sokallað talentlið**

SVIMJING
*tíðindaskriv*

Landsliðsvenjarin Petur Heðin á Fløtti var og eygleiddi til svimjikappingina á Toftum leygardagin, við tí fyri eyga at taka tey fyrstu 16 til eitt sokalla talentlið.

Tey ið blivu úttikin vóru:

| | |
|---|---|
| Helena Strøm | VS |
| Elisabeth Bærentsen | TS |
| Dagmar M. Winther | HS |
| Arni Weihe Winther | HS |
| Heðin Olsen | Reki |
| Bergtór T. Thomsen | Reki |
| Astrid Foldarskarð | Flot |
| Sasho Bjartsson | HS |
| Benjamin Simonsen | FS |
| Magnus Jákupsson | HS |
| Hildur á Fløtti | HS |
| Helena G. Jacobsen | HS |
| Gunnvá Justinussen | Skeggjar |
| Poul J. Færø | Ægir |
| Pól Mohr | FS |
| Jóhanna Bjørg Fuglø | Reki |

Hesi koma saman til fyrstu venjingarleguna vikuskiftið 5 og 6 mars, og venjingarlegan verður í Fuglafirði.



*Hetta er fyrstu ferð, at sonevnda talentlandsliðið verður tikið út, og uttan iva verður spennandi at fylgja evnaríku svimjarunum komandi árini*

*Mynd: Øssur Mohr*

# Dómararnir møttu ikki

*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

Tað var við spenningin, at Søljan og StÍF sóu fram til dystin millum kvinnuliðini hjá feløgunum báðum, sum skuldi verða leiktur sunnudagin. Ein dystur, sum í stóran mun kundi vera við til at gera av, hvussu botnurin á stigatalvuni fer at laga seg, og ikki minst mundu gestirnir vera spentar um, hvørt tað skuldi eydnast at toga seg nærri einum fimta plássi.

### Teldubræv kom ikki fram

Men tá liðini bæði skuldu fara á vøllin, stóð greitt, at her ruggaði ikki alt rætt. Tað var nevnliga eingin dómari til staðar í høllini, og tí máttu leikararnir bara ásanna, at tað so ikki skuldi verða hendan dagin, at tey skuldu avgreiða dystin.

Eftir øllum at døma kom keðiliga støðan fyri, tí eitt teldubræv við upplýsingum um dómaraásetingar ikki fann vegin fram. Í øllum førum ikki til feløgini, sum eru tey, ið hava endaligu ábyrgdina av, at dómaraparini fáa boð um, hvørjar dystir tey skulu døma.

Vanliga mannagongdin er tann, at Hondbóltssambandið sendir eitt teldubræv til bæði feløg og dómarar við upplýsingum um, hvørjir dómarar skulu døma hvørjar dystir. Hetta brævið er tó ikki meira endaligt enn so, at feløgini eisini skulu geva dómarunum endalig boð um ásetingarnar. Hesa ferð var støðan tó tann, at teldubrævið einans varð sent dómarunum, og tí hevði StÍF ikki fingið nakað bræv, har tey kundu síggja, hvørjir dómarar skuldu hava dystarboð.

### Ov bíligt

Sæð uttanífrá, so er tað tó ein ov bílig undanførsla, tá øll skuldin bara verður skumpað yvir á Hondbóltssambandið. Og í øllum førum átti onkur alarm-klokka at ringt onkra staðni, soleiðis at forðað varð fyri, at leikararnir skuldu standa sum rukkur á vøllinum sunnudagin.

Tí hóast tað áliggur feløgunum at geva dómarunum endalig boð um dystarásetingarnar, so er tað at kalla meira enn vanligt, at hesi boðini ongan tíð verða givin. Roknað verður fyri víst, at dómararnir munnu fara at koma til dystin kortini. Teir báðir ásettu dómararnir, Birgir Dimon og Kári Niclasen hava so í øllum førum fingið brævið frá HSF, men hinvegin kann tað í so máta hava verið ein vansi, at teir at kalla bara døma dystir hjá VB, tí tá VB hevur hildið sína fráboðanarskyldu mótvegis dómarunum, so hava teir sjálvandi roknað við, at hetta eisini hevur verið galdandi fyri onnur feløg.

Og eisini hjá StÍF skuldi onkur klokka ringt. Felagið hevur at kalla hvørja ferð fingið ásetingarnar um, hvørjir dómarar skulu døma, og tá einki bræv nú var komið, so mátti onkur havt lagt hetta til merkis. Ikki minst, tá tað eisini framgongur, at hinir báðir dystirnir í bestu kvinnudeildini vórðu leiktir – við ásettu dómaraparunum.

### Samskiftið má betrast

Tað er tó einki at ivast í, hvør eigur endaligu ábyrgdina av hesum. Grein 7.1 hjá HSF staðfestir, at kappingarnevndin hevur ábyrgdina av, at dómarar, tíðtakari og skrivari eru til dystirnar, og tí er tað eisini teirra skylda at boða viðkomandi pørtunum frá ásetingunum.

Sjálvandi kann sigast, at tað var eitt hendiligt mistak, tá teldubrævið ikki fann vegin fram til røttu móttakararnar, men hinvegin er hetta ikki fyrstu ferð, at slíkt hendir. Í fjør var líknandi dømi, tá dómarapar úr Hoyvík ikki stóð á mailing-listanum, og tí ikki fekk boð um, at teir skuldu døma í Klaksvík, og tí má HSF bera so í bandi, at slík mistøk verða fyribyrgd. Tað er snøgt sagt nakað, sum ikki eigur at koma fyri seg.

Ta ferðina í Klaksvík, varð dysturin kortini leiktur við hjálp av dómarum, sum koritni vóru í høllini. Hesa ferð vóru StÍF og Søljan ikki eins heppin, og tey noyðast tí at finna rúm í kalendaranum fyri nýggjari dystaráseting.